## Mandaric aftur í Onglandi

Serbiski ríkmaðurin, Milan Mandaric, seldi í fjør Portsmouth, men nú er hann aftur at síggja í enskum fótbólti. Eftir øllum at døma er Mandaric nevnliga maðurin, sum skal bjarga Leicester. Enskir miðlar skriva, at hann hevur keypt felagið fyri 275 mió kr., og ætlandi verður tíðindafundur í dag, har tíðindini verða váttað.

## Owen skjótt klárur

Michael sigur seg skjótt vera til reiðar at spæla fótbólt aftur, eftir at hann hevur verið úti við skaða, síðani Ongland í HM-kappingini spældi móti Svøríki. Ein dystur, har Owen bert fekk fáar minuttir á vøllinum, áðrenn hann small í svørðin við slitnum krossbandi. Seinastu vikuna er Owen byrjaður at renna, og bæði hann og Newcastle-venjarin, Glenn Roeder, vóna, at spælarin kann verða tøkur, áðrenn enska kappingin fer í summarfrí.




# Ongland vil hýsa HM

**Longu nú eru fyrireikingar farnar ígongd, so Ongland kann gerast vertur fyri HM-endaspælinum í 2018**

FÓTBÓLTUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Eftir at Týskland var vertur fyri HM-endaspælinum í fjør, noyðist Europa helst at bíða í 12 ár, áðrenn størsta fótbóltskappingin av øllum aftur verður í okkara heimsparti.

í 2008 verður HM fyri fyrstu ferð hildið á afrikanska meginlandinum, tá Suðurafrika er vertur, og síðani verður tað í Suðuramerika, at kappingin skal ganga fyri seg.

Tó at avgerðin um heimspartin ikki verður tikin fyrr enn um tvey ár, so verður roknað fyri vist, at Europa tá aftur stendur fyri tørni, og tá ætla bretar sær at vera tilreiðar.


*Ætlandi skal nýggi Wembley leikvøllurin verða karmur um HM-finaluna í 2018*

**Stuðlaðu Týsklandi**

Tá atkvøðast skuldi um endaspælið í 2006 á sinni, gjørdi Ongland í evstu løtu av, at teir vildu stuðla týsku umsóknini. Hetta varð gjørt, tí bretar við hesum mettu seg hava betri kort, um bíðað varð við umsóknini, og tí eru ætlanirnar um 2018 eisini í tráð við løgdu ætlanirnar.

Sæð í bakspeglinum, so er tað kanska heldur ikki so býtt, at Ongland bíðaði. Umbyggingin av Wembley hevur tikið nógv longri tíð, enn upprunaliga ætlað, men nú røkist loksins fyri eini endaligari loysn, so enski tjóðvøllurin aftur verður tøkur at hýsa landsdystum, FA-Cup finalum og øðrum stórum tiltøkum.

# Magnus vann silvur í sterkari kapping



*Magnus Andreassen, Ørvur, við steypinum úr Hillerød11. februar 2007*

**14 ára gamli Magnus Andreassen skeyt seg um vikuskiftið til silvur í sterkari bogaskjótikapping í Danmark**

BOGASKJÓTING
*Jákup Mørk*

Bogaskjótideildin hevði sent tvey føroysk umboð til kappingina í Hillerød, sum eisini virkar sum upphiting hjá bestu donsku skjúttunum undan HM-kappingini.

Til samans vóru 130 luttakarar, og skutu vaksin her yvir 18 metrar, meðan yngru skjúttarnir skutu yvir 12 metrar.

Teir báðir føroyingarnir vóru Magnus Andreasen úr Ørvi, sum skeyt compound, og Bogi Andreasen úr Vágaskot, ið skeyt recurve. Hartil tók føroyski Kristian Niclasen eisini lut í kappingini. Kristian er búsitandi í Danmark, og skeyt hann fyri eitt felag í Glostrup.

**Silvur til Magnus**

Bogi Andreasen var millum teir 16 skjúttarnir, sum vunnu seg víðari til finaluumførini, men her hitti hann í fyrsta umfarinum ein sterkan dana, sum við 110-90 sendi Boga úr kappingini.

Betri gekst hjá Magnus. Í innleiðandi bólkunum setti hann persónligt met við 572 stigum, og rakk hetta til næst besta úrslitið í bólkinum.

Í 1/4-finaluni gjørdist talan um tryggan sigur, men í hálvfinaluni var greitt, talan var um sterka mótstøðu. Her hitti Magnus skjúttin, sum gjørdist nummar trý í innleiðandi bólkinum, men í besta Robin Hood stíli varð hesin sendir úr kappingini. Yvir fýra umfør er hægsta stigatalið, sum kann vinnast, 120 stig, og av hesum fekk Magnus 116, soleiðis at hann vann dystin klárt.

Og fram til fjórða og seinasta umfarið í finaluni, var Magnus eisini á odda. Hann hevði tá skotið 86 stig móti 85 hjá mótstøðumanninum, men í seinasta umfari vann danin seg kortini eitt stig framum.

Men hóast hetta, so var talan um eitt framúr úrslit hjá 14 ára gamla Magnus. Steyp fekk hann eisini heim við sær – hetta fyri avrikið í innleiðandi umfarinum.

Kristian Niclasen, Glostrup, skeyt innleiðandi 480 stig. Hann bleiv nr. 4 í sínum bólki, men megnaði ikki at koma víðari til finaluumførini.

# Rooney er tann ljótasti

Wayne Rooney fekk ikki færri enn 34% av atkvøðunum, ta 4.000 enskar kvinnur herfyri greiddu atkøvðu um, hvør var tann ljótasta ítróttarstjørnan í heiminum.

Fáur man vera í iva um, at Rooney er ein av evnaríkastu ensku spælarunum í nýggjari tíð, men eftir øllum at døma er vakurleikin ikki eins stórur, sum fótbóltsevnini. Millum manna verður Rooney ofta róptur Shrek, og hetta navnið livdi hann væl og virðiliga upp til á atkvøðugreiðslun

Tað er fyritøkan OnePoll, sum hevur gjørt spurnarkanningina, og har segði ein talsmaður, at hóast Rooney varð mettur sum tann ljótasta ítróttarstjørnan yvirhøvur, so kann hann ugga seg við, at unnustan, Coleen McLoughlin, telist millum vakrastu sprundini í Onglandi.

20 teir fremstu í atkvøðugreiðsluni vóru annars hesir:

1 Wayne Rooney (Fótbóltur)
2 Peter Beardsley (Fótbóltur)
3 Ronaldinho (Fótbóltur)
4 Peter Crouch (Fótbóltur)
5 Ricky Hatton (Nevaleikur)
6 Boris Becker (Tennis)
7 Paul Gascoigne (Fótbóltur)
8 Luke Chadwick (Fótbóltur)
9 Prince Naseem (Nevaleikur)
10 Martin Keown (Fótbóltur)
11 Dwight Yorke (Fótbóltur)
12 Ian Rush (Fótbóltur)
13 Stephen Hendry (Snooker)
14 Ian Bootham (Cricket)
15 Steve Davis (Snooker)
16 Colin Montgomerie (Golf)
17 Nigel Mansell (Formel 1)
18 Roger Federer (Tennis)
19 Andrew Murray (Tennis)
20 Ray Parlour (Fótbóltur)


*Wayne Rooney*